# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# GRINDIN RINGASTA BRANDIÐ

Grindadrápið er størsta hóttanin móti umdømi okkara. Nógv verrið enn homofobiskir politikarar ella makrelstjalandi sjómenn.

Tað segði brandingsserfrøðingurin, Simon Anholt, í Degi og Viku fyrr í vikuni. Simon Anholt hevur gjørt kanning fyri Uttanríkisráðið um, hvat skal branda Føroyar, og hvussu vit eiga at branda Føroyar.

Boðskapurin hjá honum var rættiliga greiður: Grindadrápið er øðrvísi, tí mong fólk hava tíverri áhuga fyri tí uttanlands - og tíverri er tað eisini einasta orsøk hjá fleiri til, at tey hava hoyrt um Føroyar, sigur hann.

Tað, sum kortini kann undra er, at hann í frágreiðing síni als ikki nevnir fótbóltin. Er tað so, at nógv fólk kenna okkum - og bara fyri tað ringa - vegna grindadrápið, so kann tað ikki passa, at ein slík kanning ikki hittir fólk, sum kenna okkum - fyri tað góða - gjøgnum fótbóltin. Eru vit uttanlands, og kanska langt av landi skotin, so hittir tú altíð onkran, sum tosar um føroyska fótbóltslandsliðið.

Men sambært kanningunum hjá Simon Anholt eru Føroyar eitt ókent land, og tað einasta fólk kenna, er grindadrápið. Orsøkina sigur hann vera spurningin um hótt djórasløg, og alt stríðið og orkuna, sum felagsskapir sum Greenpeace hava lagt í slíka mál í áratíggju til tess at fáa slík mál til verulig stríðsmál.

Simon Anholt segði eisini, at høvuðsorsøkin til at negativa brandingin við grindadrápinum er so sterk er, at grindadráp er ein góð søga hjá fjølmiðlum: Myndirnar eru so sterkar, har er nógv blóð, og tað merkir, at talan verður um eina høvuðssøgu, sum fær fólk at keypa bløð og hyggja í sjónvarp.

Hann heldur, at tað er av týdningi, at føroyingar hava virðing fyri negativu umtaluni og ta styrki, hon hevur og mælir føroyingum til sum móttrekk at koma við eini eins góðari søgu um grindadráp, sum fær fólk at fáa Føroyar høgt í metum. Men tað má ikki bara vera ein søga um, at Føroyar banna grindadrápi, tí tað er ikki nóg spennandi. Tað má



gerast á ein spennandi og dramatiskan hátt, segði hann. Hvør hesin háttur er, meldar søgan einki um.

Men vit verða helst noydd at tálma grindadrápi kortini. Ikki av tí at fólk úti í heimi taka synd í hvalunum, men tí at maturin er eitraður. Tá vit ferð eftir ferð fáa læknalig tilmæli um ikki at eta grind, so má tað fyrr ella seinni enda við, at grindadrápið steðgar.

Tann dramatiska søgan kann so verða, at grindin hjá føroyingum er eitrað av londum, hvørs íbúgvar halda tað verða so synd at drepa hval - samstundis sum tey ikki himprast við at drepa fólk. Móður Danmark ein av tjóðunum, sum drepur fólk.

## Tey sum drepa fólk eitra okkum grindina

# Gevið okkum pengarnar aftur



Tað kostaði Fótbóltssambandinum, og harvið føroyskum fótbólti í breiðari merking, eina stóra milliónaupphædd, tá ið føroyska fótbóltsslandsliðið fyri einum lítlum ári síðani leyp upp eftir styrkislistanum hjá FIFA. Ein bonusavtala gav spælarunum nógvar túsundkrónuseðlar í lumman - ja, so nógvar, at FSF fekk trupulleikar við at liva upp til avtaluna.

Nú eru seinastu tíðindini, at Føroyar í einum eru rapaðar 20 pláss niður eftir FIFA-styrkislistanum.

Hevði tað so ikki verið upp á sítt pláss, at spælararnir goldu pengarnar aftur.

# Honnugøta ella Hannugøta

Honnugøta ella Hannugøta. Tann trupulleikan skal Tórshavnar kommuna taka støðu til: Ein gøta á Argjum skal eita Honnugøta. Tað sigur í øllum førum mentamálanevndin hjá Tórshavnar kommunu. Gøtunavnanevndin hevur skotið upp, at gøtan, sum er ein síðugøta til Argjavegin, skal kallast upp eftir Jóhonnu Margrethu Joensen, sum fekk gøtuna í brúðargávu í 1925.

Men trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla tó til, at gøtan skal eita »Hannugøta« heldur enn »Honnugøta«. Men tað heldur mentamálanevnin ikki.

Tað kann virka løgið at stríðast um eitt »a« og eitt »o«. Men veruleikin er tann, at á havnarmáli - ella »miðstaðarmáli« - er hetta u-umljóðið, sum broytir Hanna til Honnu, ikki komið enn. Havnarfólk siga »hjá Hanne«. Og av tí, at eitt u ikki stendur í endanum, so kanna a'ið ikki broytast til eitt o. Tað er u-umljóðið, sum ger hesa broyting. Tí hevði rætta navnið at givið gøtuni verið »Hannugøta«. Tá hevði Tórshavnar Býráð sýnt havnardialektini respekt, og hetta er enntá góðkent sambært orðabókini.

Trupulleikin er kanska tann, at bara fýra av trettan býráðslimum eru úr Havn, telja vit argjamannin og hoyvíkingin við, so verða tey seks. Tað er framvegis ikki ein meiriluti í Tórshavnar Býráð.

**Tað bleiv »Hannugøta«**

Av tí at býráðsfundurin í Havn varð hildin áðrenn hetta blað fór til prentingar, sendu vit øllum býráðslimunum greinina. Og borgarstjórin mælti til, at gøtan skal eita Hannugøta - á góðum havnarmáli, og hetta varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 3 ímóti - so havnarmálið vann á bygdamálinum!



## Løgmaður sum fluga í fløsku

BJARNI DJURHOLM
KJAK Á SÍÐU 16



## Lakka paradís í homofobia

HØGNI DJURHUUS
KLUMMA
VIKUSKIFTIÐ SÍÐA 15




*John William Joensen, blaðmaður á Norðlýsingum...*

# Hvør verður stjóri á Dimmu?

Dimmalætting skal seljast í seinasta lagi mánadagin, sigur Líggjas í Bø, sum umboðar tey, sum eiga blaðið.

Enn eru tað bara Norðlýsið og Vágaportalurin, sum alment hava boðað frá, at tey eru sinnað at keypa blaðið. Tað ljóðaði, at fyrrverandi sparikassastjórin í Klaksvík eisini var áhugaður, men hetta avsannar Eyðfinn Reyðberg blankt.

Vit bíða í spenningi til mándagin. Spurningurin er so, um Ólavur í Beiti verður ábyrgdarblaðstjóri og John William Joensen tíðindaleiðari - ella um tað verður øvugt.



*...ella Ólavur í Beiti, sum skrivar Vágaportalin*

**Sosialurin**

Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo